gult8 cyan8 magenta8 svart8

DAGSINS MEINING

Mennandi leikir

Føroyingar klára seg væl í fleiri ítróttargreinum í Oyggjaleikunum á Oynni Man, og tað fegnast allir føroyingar um Sjálvt tey, sum kanska ikki hava so stóran áhuga fyri ítrótti, fylgja við í útvarpi og sjónvarpi í stórum spenningi og fegnast, tá føroyingar vinna, fáa silvur ella bronsu-heiðursmerki.

Seinast vóru Føroyar nummar sjey, men enn er ov tíðliga at siga, hvat nummar Føroyar verða í ár. Í summum førum er gingið verri enn roknað varð við, t.d. í fimleiki hjá kvinnum, og í øðrum kappingargreinum er gingið betur, t.d. í kvinnufótbolti. Men gongdin higartil bendir á, at heiðusmerkini kanska ikki verða so nógv sum seinast.

Annars skulu vit ikki stara okkum blind at heiðursmerkjum. Tað er sjálvandi stuttligt hjá bæði ítróttarfólkum og øðrum við, at føroyingar vinna. Men vit skulu ikki gloyma, at tað er ein fragd at vera við, og tað at verða tikin út til kappingar er í sjálvum sær eitt avrik og eitt álit.

Í yvirlitinum síggja vit, at umboðini fyri bretskar oyggjar, ella har bretska árinið er stórt, fáa tilsamans rættiliga nógv heiðursmerki. Hetta kemst serliga av tí, at hesi vinna nógv heiðursmerki í einstaklingakappingum, segði leiðarin fyri føroyingarnar, sum kappast í greinum innan frælsa ítróttin.

Í hesum sambandi vísti hann á, at millum ungar føroyingar er stórur áhugi fyri at renna. Eini 1000 ung vóru við í kappingum ífjør, men so legði hann afturat, at umstøðurnar at íðka frælsan ítrótt í Føroyum eru ikki nóg góðar. Í sjálvum høvuðsstaðnum er t.d. eingin rennibreyt.

Og so koma vit til tað: tað skerst ikki burtur, at tað var út av lagi illa atborið, at ein rennibreyt ikki varð gjørd við Tórsvøll. Mótstøðufólkini siga, at áskoðararir sita so langt burtur ífrá, tá fótbóltsdystur er, og at stemningurin tí ikki verður tann rætti. Viðhaldsfólk siga hinvegin, at tað er nakað tvætl, tí tað snýr seg um einar 2-3 metrar afturat.

Vit hava í dag eitt stadionøki í Gundadali, har ónatúrliga nógv virksemi er, og sjálvandi skulu frælsi ítrótturin eisini havt síni øki og breytir har. Tað var jú eisini ætlanini sambært teimum fyrstu teknningunum til eitt stadionøki, sum eru frá miðskeiðis í farnu øld.

Øll eru ikki líka kring til fótbólt og handbólt, og tað er heilt givið, at vit kundu havt nógv fleiri íðkandi innan frælsa ítróttin, um umstøðurnar vóru betri, og um skúlarnir gjørdu meiri við tann partin. Vit mugu ikki gloyma, at vit skulu eisini hugsa um breiddina ítrótti, kanska fyrst og fremst, siga summi, tí úr breiddini koma úrvalsíðkararnir

Ítróttur er sunnur og er mennandi fyri kropp, sál, felagsskapskenslu, einstaklingin og samfelagið sum heild og tí má samfelagið kenna sínar skyldur. Tað verður eisini gjørt í ávísan mun, men eitt størri arbeiði kann gerast. Men tit, sum hava vunnið: tillukku, og so mugu vit vóna, at tað gongst føroyingunum væl í teimum greinum, sum eftir eru.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Felagið í kríggj ímóti sínum egnu

Líggjas Høgnesen

Í hesum døgum fáa brúkarar í fjarhitafelagnum skriv við hóttanum um stongsul og sakførara. 8 dagar ella fellur hamarin. Hóðast undirritaði hevur rindað kr. 1212 um mánaðin seinastu 6 mánaðirnar, hóttir Jóannes Hansen við at steingja heita vatni. Slíkar hóttanir vísir bert hvussu torført tað er hjá okkum brúkarum at samskifta við stjóran Jóannes Hansen. Hetta skriv er tó ikki vent ímóti stjóranum. Óteljandi skriv eru send stjóranum, men har er sum kunnugt eingin heima. Skrivið er heldur ætlað sum ein vekjara klokka til onkran býráðslim.

Býráðsins leiklutur.
Býráðið hevur skyldu at tryggja at eingin mismunur verður gjørdur á borgarum í Tórshavnar Kommunu. Eg kann taka eitt dømi. Ein granni hjá mær skal í ár rinda kr. 2100 um mánaðin. Tað svarar til kr. 25.000 um árið. Sjálvur skal eg rinda uml. kr. 20.000 í ár fyri hita og heitt vatn. Eitt meðal húsarhald við oljufýring rindar uml. kr. 9000 um árið. Er nakar munur? Nei bert kr. 16.000

"License to kill"
Kanska áttu vit at bjóða italsku mafiuni heim til Føroyar og víst teimum, at tað ber til at føra ein modernaðan, brutalan handilspolitik uttan at drepa nakran. Við Býráðsins vælsignilsi sleppur stjórin at sveiggja við svørinum sum honum lystir. Gongst illa í felagnum, - fer oljuprísurin upp, - hevur stjórin brúk fyri meira peningi til viðlíkahald, ja so hækkar hann prísin. Einki hjálpir hvussu vit spara. Nýtslan hevur lítlan týdning. Hetta havi eg áður víst á.

Politisk lyftir.
Hetta er ein innilig áheitan á Jan Christiansen, sum undan býráðsvalinum svór at hann fór at gera nakað við óskilið í fjarhitafelagnum. "Now is the time", harra borgarstjóri.

Í rættin við fjarhitafelagnum
Nú er nokk tosað. Til eigarafeløgini ! Lat sakførara fáa møguleika at kanna juridiska partin í málinum, soleiðis at vit "einaferð med alla" fáa staðfest, um felagið verður rikið á ein lógligan hátt smb. galdandi reglum ella ikki. Hava vit rætt, so eigur málið at koma fyri rættin.

Lógina í egnar hendur.
Kemur Jóannes Hansen inn í mín kjallara at gera herverk, so skal hann vita at hann verður meldaður til løgregluna. So einkult er tað.

Fróðskaparfelagið skipar fyri FRÓÐARFUNDI í oktobermánaði

TÍÐINDASKRIV
Vegna Føroya Fróðskaparfelag
Dánjal Petur Højgaard, formaður

Fróðskaparfelagið fer nú at víðka um virksemi sítt við at birta upp undir framtíðar granskingarverkætlanir í Føroyum. Til tess at bøta um samskiftið millum føroyskar granskarar og til at mennavaksa um føroyska granskingarumhvørvið, er ætlanin at halda ein FRÓÐARFUND, kl. 10-16 leygardagin 27. okt. 2001. Fundurin er fyri øll,ið eru útbúgvin á lærdum háskúlum ella samsvarandi, og sum fáast við gransking. Fundardagurin byrjar við innbodnum fyrilesara, ið greiðir frá hugtakinum "at granska". Fundarfólkið fer síðan í bólkum at gera uppskot til komandi verkætlanir. At enda verður felagsfundur um uppskotini.

Á fundinum er eisini ætlanin, at føroyskir granskarar kunnu hittast til tess at styrkja sambandið sínámillum og annars skifta orð um framtíðar granskingarverkætlanir í Føroyum. Tey ymsu frøðiøkini fáa høvi at skifta orð hvørt sær; men eisini er ætlanin, at tvørfrøðiligar verkætlanir verða orðaðar.

Fundurin verður hildin í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Longu nu kann verða boðað frá luttøku hjá Føroya Fróðskaparfelag, handan Á 5, postrúm 209, FO-110 Tórshavn (teldupostur: maudh@setur.fo)

Tilskilið navn, frøðigrein, útbúgvingarstig og granskingarøki.

Um ein vil vita meira um tiltakið, ber til at seta seg í samband við formannin Dánjal Petur Højgaard, teldupostur: danjalph@post.olivant.fo

Føroya Fróðskaparfelag er stovnað í 1952 og hevur eitt nú til endamáls at fremja samstarv millum fólk í Føroyum, sum takast við vísindaligt starv, at upplýsa alment um vísindalig viðurskifti við útgávuvirksemi og fundum og at menna føroyskt sum vísindamál.

Bøkur og rit, ið Fróðskaparfelagið gevur út, eru fyrst og fremst Fróðskaparrit, Supplementa til Fróðskaparrit og Frøði. Harafturat koma orðabøkur og einstakar aðrar bøkur.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at elskaði maður mín, pápi og abbi okkara

Hans Olaf Debes
av Oyri

andaðist mikudagin 11. juli á Landssjúkrahúsinum,
76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju
sunnudagin 15. juli kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi
Palla og Sámal

Tey, ið vilja minnast Hans Olaf,
kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna í Norðskála

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9

VIÐMERKINGAR

Einkisigandi politisk ringrás

Michael Jensen
sambandsmaður

Nú er nakað síðani, at skilagóður dialogur hevur verið um framtíðina, og hvussu framtíðar leiklutur Føroya skal síggja út. Uttanumtos og einki-sigandi tveystavilsisorð eru næstan vorðin heildar og realitetspolitikkurin hjá loysingarsinnaðum og hjá sambandssinnaðum politikkarum.

At ynskja loysing er skiljandi, men hvat hendir aftaná tað? Tað sama er við sambandinum, hvat hendir tá sambandið hevur sigrað? Eftir at hesi bæði slag-orðini eru komin, heldur tann áhugaverdi dialogurin heilt uppat, og tær stóru visión-irnar doyggja fullkomiliga.

Loysing og samband eru ikki konkretar forbetringar í sær sjálvum, tí hetta eru bert nakrar fortreytir. Saman-ið loysingini ella saman-ið sambandinum skulu onnur og ítøkilig mál leggjast omaná, og tað eru hesi, sum gera nakað ítøkiligt við dagligdagin hjá okkum. Málini, vit leggja omaná, er tann veruliga realitetspolitikkurin, og tað er hesin politikkur, sum fullkomiliga er horvin í kjakinum, nú loysing og samband ráða. Men realitetspolitikkurin er sjálvandi ymiskur treytaður av, um vit velja samband, loysing ella hvørki...

Haran og skjaldbøkan
Loysing og samband eru sostatt ikki nakað sum einstakt ger tog og meg ríkari, og tí er undarligt, at tey eru vorðin høvuðsmálini. Tann veruligi realitetspolitikkur skal jú gera dagin betri ella verri fyri tann einstaka, og hvørki loysing ella samband kunnu í sínum líka gera nakað sum helst.

Ístaðin eru loysing og samband við til at seta fortreytirnar fyri realitetspolitikkin. Tað er undrunarvert, at vit altíð byrja kjak við loysing og samband, og síðani grava vit djúpri niður til realitetspolitikk, sum aðrastaðni er nærri skorpuni enn her hjá okkum. Í mun til onnur lond hava vit lyndi til at evja alt uppí saman, og hetta minnir ikki sørt um søguna um haruna og skjaldbøkuna, sum skuldu renna kapp. Vit eru haran, sum tók sær av løttum og at enda sovnaði undir einum træi. Tá hon vaknaði, var skjaldbøkan longu komin á mál. Skjaldbøkan hevði vunnið á haruni, av tí at hon spakuliga men støðugt var farin beina kós ímóti málstrikuni.

Og tískil koma vit politiskt fram sum haran, sum hóast sín førleika ikki kom á mál til tíðina, meðan hini londini kanska nýta haruna sum sína politiska fyrimynd og fara beint til kjarnuna sum ger nakað við umstøðurnar hjá mær og tær.

Kritikkurin er ikki bert versa loysingar-argumentatión sum heild, men eisini tey vánaligu sambands-argumentini, hava lindi at gera "sambandið" til eina beinleiðis betring av gerandisdegnum hjá tí einstaka, men so einfalt er tað ikki, tí tað manglar nakað meira.

Tað, sum manglar, er dialogur um reella realitetspolitikkin t.v.s. støðutakan, bygnaðin av framtíðar samfelagnum, um okkara land yvirhøvur skal hava eitt vælferðarsamfelag (heilsubót, skúlaskapur, skattsstøði v.m.…), og eisini hvat tilknýti Føroyar skal hava til umheimin o.s.fr.

Brúk fyri hvørjum øðrum
Lond hava brúk fyri hvørjum øðrum, so tilber at selja, keypa, kappast, fara í hernað o.s.fr., men í Føroyum hava politikkarar bert brúk fyri sær sjálvum og sínum loysing/samband kjaki, tí hetta er vorðið teirra høvuðsmál, og so velja fólk eisini eftir høvðusmálum flokkanna. Tí hoyra vit sjáldan veruligar visiónirnar og dreymar frá politikkarunum. Eisini síggja vit alt hettar aftur í tí førda politikkinum, sum líkist einum "peu en peu" politikki, sum allastaðni resulterar í óendaligum "lappa-loysnum".

Onkur kallar hettar fyri eina "einkisigandi politiska ringrás", sum okkara politikkarar ganga og mala í. Føroyskir breyðpolitikkarar skilja ikki, at vit hava brúk fyri øðrum enn okkum sjálvum, og at onnur hava brúk fyri okkum. Vit mugu gera okkum galdandi og koma fram við okkara dugnaskapi, men allar fyrst mugu visiónirnar fram í ljósi, og tær koma neyvan so leingi sum vit mala í tí "einkisigandi politiskari ringrásini".

"Ego-dyrkan"
Eitt gott dømi um tað sokallaða „politisku ego-dyrkanina" kemur týðiliga fram, tá talan er møguligan ES limaskap. So skjótt sum vit tosa um innliman í ES, verður føroyski fiskurin líkastilláur við tann stóra og dýra gimsteinin, sum hini londini vilja taka frá okkum. Øll ES-lond verða skýrd óndsinnað og næstan banditar, og tað er hetta, sum er tann ekstrema politiska "ego-dyrkan", sum flestu føroyskir breyðpolitikkarar bera í sær. Eingin skal koma til oyggjalandi við góðum ráðum, tí vit vita best sjálvi, og hetta er tað sum skínur so týðiliga ígjøgnum í føroyskum politikki. Kanna vit møguleikan um at gerast partur av mótpartinum, broytist okkara hugburður óivað, men fyrst mugu vit úr óndu ringrásini. Men ein felagsskapur krevur altíð nakað, og er tað so, at hann krevur nakað av fiski, so kann tað allíkavæl verða, at tað liggur lønsemi aðrastaðni sum t.d. í nýggjum vinnum og vitan. Tað er jú ES, sum í dag setir treytirnar, og spurningurin er, hvussu lagaligur mótparturin kanska blívur, og tí mugu vit gera okkum nakrar tankar um at gerast partur av mótpartinum.

Lokalur main-stream
Fleiri smálond og atlond hava fingið áhugaverdar avtalur við ES, og hesi hava eisini fingið sína ávirkan, samstundis sum tey eisini eru tryggjaði egin-menning í ES-høpi. Eitt av hesum londunum er Áland, har rikisrættarliga støðan líkist okkara í ein stóran mun. Evropa gerst longu størri í 2004, og kanska verður felagsskapurin dupult so stórur tá, men tað vita vit ikki enn. Tað er óskiljandi, at politikkarar ikki hava áhuga í at gera sær metingar um, hvønn týdning Føroyar skal fáa í Evropa og hvønn týdning, Evropa skal hava á okkum. Tað eru umleið 10-20 sløg av ES limaskapi, og tí átti at verið áhugavert at hugt nærri eftir hvørjum einstøkum slagi av limaskapi. Tess longri vit bíða, tess meira mennast limalondini, og tess meira verða vit afturúr sigld.´

Kasparov fekk rætt
"At loysa fyri loysings skyld gevur ikki meining," segði Gary Kasparov, tá hann var í Føroyum. Eisini segði hann, at vit eiga at finna okkara leiklut í heimssamfelagnum, tí øll lond verða meir og meir bundin av hvørjum øðrum. Okkara leiklutur við umheimin skal hugsast væl ígjøgnum. Til hetta krevst nakrar visiónir. Velja vit røttu "plaseringina", ja so enda vit har, sum vindurin blæsir okkum. At verða innanfyri í heimssamfelagnum er at verða partur av einari egin-menning, saman við øðrum, sum antin so ella so fáa ávirkan á føroyskt vinnulív, føroyskan hugburð, føroyska støðutakan, føroyska mentan o.s.fr.

Tann størsta hóttanin fyri okkara tjóð eru ógvusligu umhvørvisbroytingarnar, sum eru ein veruleiki norðanfyri Føroyar. Hetta er ein trupulleiki, sum alsamt nærkast Føroyum.

Um 40-50 ár standa vit kanska við trupulleikum, sum vit ongantíð høvdu droymt um, og tá hoyra vit ikki slíkar visiónir frá breyðpolitikkarum; fyri tað fyrsta, tí at ov seint er; og fyri tað næsta; tí at allir uttan Jákup Sverri liggja undir grønutorvu. Umhvørvið fer at ávirka okkara høvuðsvinnu, men nakað ógreitt er tó í hvønn mun.

Alt týðir uppá, at vit fáa brúk fyri øðrum, líka so nógv sum onnur hava brúk fyri okkum, og ein uppskrift er at gera tað gjøgnum limaskap í ES. Broytist nakað í umhvørvinum til tað verra, eru vit tvungin til at finna okkurt annað at liva av. Vit hava brúk fyri vitan og nakrar "makkarar", so vit aftur kunnu fylgja við í heimssamfelagnum.

Oljuvinnan ikki allar ævir
Oljuvinnan verður oftani nýtt sum ein orsøk til at renna undan øllum nevndu argumentunum,ið byggja uppá egin-menning saman við øðrum, men eitt er givið - oljuvinnan varir ikki í allar ævir, og tað er samstundis heldur ikki føroyingar,ið fara vinna tann stóra olju-vinningin. Hvør ræður longu á íbúðarmarknaðinum í Havn í dag? (hetta er áðrenn oljan yvirhøvur er funnin!)

Oljufeløgini hava gjørt íløgurnar í leitingina, og sjálvandi eru tað hesi,ið fáa tann stóra olju-vinningin, um hann verður funnin.

Kann eisini samanberast vid ein lotto-seðil sum oljufeløgini hava keypt. Tann sum keypir vinnur ..... kanska.....!

Minningarorð um mín elskaða bróður
Jákup Monrad Joensen
(Jakke beiggja)

Rødd tín ei tagnað
í bergið er rist
ljómandi hátt enn sum áður
andshetja fræga, ei hava mist
í øldir vær viljum tær fagna
ein fosturlandskappi sum fáur

Sum sólin á hásummardegi
hátt fragdarljómin tú bar
kærleikslogin geisandi víða
avreksverk mongu sjónliga sær
fyri rættvísi altíð vildi stríða
teim á skuggasíðu lívsins
kærleika bar – til almikla gleði

Svá geislandi virkisfýsni
randaði teg
barnalundin, ungdómur
tokka tín hevði
kennara anda í brósti
alla orku í vænu
samljóðsleið legði
millum andshetjur tann størsti.
Bróður! á kærleiksfyltu leiðina
leiddi tú meg.

Ei glitrandi heiðurskrúnu her at sjá
men tú nú í himnasølum hana ber
har fagnaðarljómur um vir
har grátur, pína og sorg ei er
ein ljómandi gullprýddur staður
til dýrdmikla himmalin stóð tín trá

Tú bar okkum kærleika, lívsmót at stríða
tú fylti øll hjørtu við gleði
ein ljósberi altíð á ferð
stríðsfúsur á kærleikans vegi
tín hugsjón meg fyllir, meg ber
ótømandi kelda, brúsandi hugflogið
víða.

Kærleikin til Guð og næsta
altíð var títt mál og aðalmið
tú troyst okkum veitti til
síðstu stund
brimandi kærleikans login við lið
til ævigan fagnað eftir stuttan blund
í teim ævigu bústøðum akker trygt vil
kasta

Hjá Faðir Ljósanna ævigt at verða
í Himmalsins dýrd nú tú er
á ævigu ljósins kærleikans strond
hjá einglanna skara lovsong framber
Samansjóað lívsins ævigu bond
Kæri bróður! Alra tøkk eg vil tær bera!

Ærað veri minnið um stríðsmannin fyri sonnum rættvísi, frælsi, javnrætti og brøðralag!
Takk fyri alt.

Sólmundur